## Ísfiskatrolarar gjørt roktúrar

Fýra av ísfiskatrolarunum hjá Faroe Seafood og báðir ísfiskatrolararnir í Leirvík eru longu komnir aftur av túrinum, sum byrjaði 3. jóladag. Øll skipini hava havt rokfiskiskap. Heykur og Falkur hjá Faroe Seafood eru longu lidnir at landa í Saltangará. Skipini høvdu 486.000 pund. Stekur og Bakur, sum eisini fóru út 3. jóladag, verða í løtuni landaðir, og teir hava út við 400.000 pund. At enda landa eisini leirvíkstrolararnir, Polarhav og Størnan, í Saltangará seinnapartin í dag. Teir hava 480.000 pund. Tvey onnur ísfiskaskip, Rókur og Lerkur hjá Faroe Seafood, landa ætlandi mánadagin. Fiskiskapurin hjá teimum hevur verið heldur lakari enn hjá hinum seks skipunum, men Rókur og Lerkur hava í dag umleið 280.000 pund inni.

## Førarahundur flýddur undan fýrverki

At djór ræðast fýrverk, hoyra vit hvørt ár í sambandi við nýggjárshaldið. Hetta hevur fingið sera óhepnar avleiðingar fyri Una Rasmussen í Norðragøtu, sum í gjár misti førarahund sín av fýrverki. Tá Uni Rasmussen kom at húsum stutt eftir klokkan 15 í gjár, brast okkurt fýrverk nærindis. Førarahundurin gjørdist so skakkur, at hann tók til beins og er ikki sæddur síðani. Førarahundurin hevur sera stóran týdning fyri blinda søldfirðingin. Hundurin kennir allar leiðir, sum Uni Rasmussen gongur og hevur tí ómetaliga stóran týdning fyri hann. Um onkur hevur sæð hundin, so kunnu tey seta seg í samband við Una á telefon 228775. Hundurin er svartur og hevur band um hálsin.

# Óskil hjá trolbátum



*Føroya Skipara-og Navigatørfelag heldur, at óskilið við fleiri ymiskum avrokningarhættum hjá smáu trolbátunum má halda uppat. Myndin er tilvildarliga vald*

Mynd: Vilmund Jacobsen

**Felagið Trolbátar hevur ikki sáttmála við Føroya Skipara- og Navigatørfelag, og felagið er heldur ikki partur av Føroya Reiðarafelag. Menn missa inntøkutrygd, og vandi er fyri, at teir eisini missa rættin til sjúkrapening frá Lønjavningarstovuni**

AÐALFUNDUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í síni frágreiðing til aðalfundin hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag týsdagin, nam formaður felagsins við viðurskiftini hjá smærru trolbátunum, har manningarnar framvegis verða avroknaðar upp á fleiri ymiskar mátar.

- Føroya Skipara-og Navigatørfelag (FSN) hevur ikki sáttmála við Felagið Trolbátar, og hetta felag er heldur ikki partur av Føroya Reiðarafelag. Tó brúkar Lønjavningarstovan sáttmálan við Reiðarafelagið, sum grundarlag fyri útrokning av inntøkutrygd.

Eyðstein Djurhuus segði, at fiskimenn soleiðis missa inntøkutrygd, og vandi kann verða fyri, at teir eisini missa rættin til sjúkrapening frá Lønjavningarstovuni, tá hesir ikki eru løntir sambært galdandi sáttmála.

Skattavaldið kann eisini álíkna eyka skatt,

um teir gerast varugir við, at fiskimenn ikki verða avroknaðir sambært sáttmála.

### Mynstringarskylda

Hann segði, at manningarnar við smærru trolbátunum eru undir mynstringarskyldu, og at teigurin á mynstringarskjalinum um, hvør sáttmáli/avtala skal brúkast, eigur at verða fyltur út.

- Um ivamál taka seg upp um, hvat ið er galdandi, hevur reiðarin próvbyrðuna. FSN førir eitt rættarmál vegna ein lim sum krevur, at avroknast skal eftir sáttmálanum.

Eyðstein Djurhuus setir spurnartekin við, um rætturin er rætta staðið til at fáa hendan skipabólk undir skipaði viðurskifti.

- Allir partar mugu síggja, at óskilið við so nógvum ymiskum avrokningarhættum má halda uppat, legði formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag aftrat.

# Uppsparingin ov lítil

**- Skulu fiskimenn fáa eina nóg góða eftirlønaruppsparing, verður neyðugt at fara yvir til eitt prosentvíst inngjald. Tað heldur Føroya Skipara-og Navigatørfelag**

AÐALFUNDUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Núverandi eftirlønarskipan hjá fiskimonnum hevur ein innbygdan skeivleika sum ger, at teir, ið forvinna frægast, sum oftast eru teir, ið spara minst upp, segði Eyðstein Djurhuus á aðalfundi*

Mynd: Jens Kr. Vang

Á aðalfundinum viðgjørdi formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag, Eyðstein Djurhuus, eisini eftirlønarviðurskiftini í fiskiskipaflotanum. Hann ásannaði, at verandi skipan við einum inngjaldi fyri hvønn mynstraðan dag helst ikki er hin rætta.

- Øll onnur á arbeiðsmarknaðinum gjalda inn til pensjón í mun til inntøku, og hetta er galdandi bæði fyri há-og láglønt.

Hann vísti á, at núverandi skipan hevur ein innbygdan skeivleika sum er, at teir, sum forvinna frægast, sum oftast eru teir, ið hava eina skiftisskipan og harvið fægst dagar í sjónum.

Eyðstein segði, at eisini fyri manningar, sum eru við skipum, ið ikki geva so góða úrtøku, mugu menninir hanga í og vera nógvar dagar burturi.

Skipanin virkar tí soleiðis, at teir, sum hava bestu ráðini, mangan eru teir, sum spara minst upp.

- Hetta er galdandi bæði fyri partin hjá manningini sjálvari og reiðaranum, legði hann aftrat.

### Reiðarar trekir

Eyðstein vísti á, at sum nú er, gjalda báðir partar eins nógv inn í skipanina.

- Reiðarar hava verið sera trekir at hækka sín part av inngjaldinum. Úrslitið er, at uppsparingin er alt ov lítil. Um vit skulu hava eina nóg góða eftirlønaruppsparing, mugu vit fara yvir til eitt prosentvíst inngjald.

Formaðurin í FSN segði, at felagið hevur lagt eitt uppskot fyri Reiðarafelagið, har reiðarans partur av daggjaldinum er umroknaður til eitt prosental.

- Eftir hesum uppskoti kemur maðurin so sjálvur at gjalda ein størri part enn nú.

Hann segði tað vera sera umráðandi at fáa gjørt nakað munagott við eftirlønartrupulleikan nú.

- Reiðarafelagið skilir væl okkara støðu, og væntandi fara teir at viðvirka til eina loysn, segði Eyðstein Djurhuus.



*Hóast reiðarar halda, at yvirmannapartarnir eru alt ov høgir við línuskipum, væntar FSN ikki, at talan verður um kollveltandi broytingar*

Mynd: Vilmund Jacobsen